Fróðskaparsetur Føroya

18. februar 2010

**Fundarfrágreiðing frá fundi í bygnaðarbólkinum 5/2010**

| | |
|---|---|
| Fundardagar: | 16., 17. og 18. februar 2010 |
| Fundarstað: | Ovastova |
| Dagur og klokkutíð: | Týsdagur 16. februar 2010 kl. 8.30 – 12.00 |
| Til staðar: | Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus, Hanna Horn, Birgit Fredriksberg, Anni Djurhuus (frá kl. 10.00) og Kári á Rógvi (frá kl. 9.40)<br>Ikki til staðar: Jóannes Hansen (hevði givið avboð vegna sjúku allar dagarnar) |
| Dagur og klokkutíð: | Ónsdagur 17. februar 2010 kl. 8.30 – 12.00 |
| Til staðar: | Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus og Hanna Horn,<br>Ikki til staðar: Jóannes Hansen, Birgit Fredriksberg, Anni Djurhuus og Kári á Rógvi |
| Dagur og klokkutíð: | Tórsdagur 18. februar 2010 kl. 8.30 – 15.00 |
| Til staðar: | Súsanna Mortensen, Hans Pauli Joensen, Zakaris Svabo Hansen, Rúna Hjelm, Randi Durhuus, Hanna Horn og Kári á Rógvi (frá kl. 10.15).<br>Fíggjarleiðarin Hugin Skaalum var við til viðgerðina av máli 9 (kl. 8.30-9.15)<br>Ikki til staðar: Jóannes Hansen, Birgit Fredriksberg og Anni Djurhuus |

Skrá fyri fundin:

**Arbeiðssetningur – grein fyri grein:**

1. Definera og skipa megindeildirnar á setrinum, millum annað kanna møguleikan fyri, at deildirnar kunnu vera færri í tali enn nú (smb. § 16).
   ***Hans Pauli*** *tekur sær av at gera ein samandrátt av funktiónunum, sum vit hava á Setrinum í dag, og eitt upplegg til framtíðar bygnað.*

2. Definera arbeiðsuppgávurnar og heimildirnar hjá dekanunum (smb. § 15).
   *Hetta er gjørt.*

3. Definera akademisk, fyrisitingarlig og tøknilig størv, so starvsinnihaldið verður greitt og dynamiskt.
   ***Zakaris*** *átekur sær at gjøgnumganga uppskot frá rektaranum um framtíðar akademisk størv á Setrinum.*

4. Økja um møguleikar fyri tvørgangandi gransking í samstarvi við aðrar føroyskar stovnar.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

***Jóannes** nærlesur strategiskjølini frá deildunum og ger eina niðurstøðu um, hvat Setrið kann gera á hesum økinum.*

5. Seta karmar fyri skipan av lestrarráð og uppgávum tess (smb. § 17).
   *Hetta er gjørt.*

6. Seta karmar fyri skipan av akademiskum ráð og uppgávum tess (smb. § 18).
   ***Rúna og Randi** skulu kanna nærri, hvørja funktión tílík ráð hava við onnur universitet í Norðurlondum.*

7. Starvsfólkapolitikkur/Samstarvsráð.
   ***Súsanna og Rúna** gera eitt uppskot til starvsfólkapolitikk.*

8. Seta karmar fyri samskifti innanhýsis og uttanhýsis.
   ***Randi** ger eitt uppskot til framtíðar samskitfti á Setrinum.*

9. Seta karmar fyri umsiting av fíggjarviðurskiftum, harundir menning av undirstøðikervinum og inntøkukeldum afturat almennu fíggingini.
   ***Hugin og Rúna** gera eitt uppskot til skipan av fíggjarøkinum á Setrinum.*

**Fundarfrágreiðing frá 16. februar 2010:**

Av tí at vit ikki vóru fullmannað, tá vit byrjaðu fundin, varð avgjørt fyrst at viðgera mál 3, sum var viðgerð av uppskoti frá Jóan Paula Joensen, rektara, um framtíðar akademisk størv á Setrinum.

**3.** Zakaris byrjaði við at leggja fram arbeiðsskjalið frá rektaranum um vísinda- og lærarastørv á Fróðskaparsetrinum. Bygnaðarbólkurin hevði hesar viðmerkingar:

Almennar viðmerkingar:

a. Pedagogiskir førleikar eru næstan ikki nevndir í sambandi við krøvini til størvini. Atlit eiga at verða tikin til hetta í sambandi við starvssetanir.
b. Setrið eigur at halda seg til tær avtalur, sum eru á almenna arbeiðsmarknaðinum í sambandi við setan av nýggjum starvsfólkum.
c. Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar eigur Setrið at taka umflokkingar av lønum upp við Lønardeildina, soleiðis at fólk í sama starvsbólki verða lønt eins.
d. Setrið eigur saman við fakfeløgunum og lønardeildini at arbeiða fyri, at førleikamenning verður viðurkend og raðfest í lønarsamráðingum.

Aðrar viðmerkingar til størvini:

e. Av tí at adjunktstørvini eru útbúgvingarstørv, eiga tílíkar setanir at binda Setrið til at gera útbúgvingarætlanir fyri hesi starvsfólk. Universitetspedagogikum eigur somuleiðis at vera partur av einari tílíkari útbúgvingarætlan.
f. Mett varð, at starvsbólkarnir uttanseturslektarar og –professarar ikki eru neyðugir, tí teir líkjast núverandi starvsbólkunum *Adjungeraðir lektarar og –professarar*.
g. Mett verður, at tørvur er á nýggja starvsbólkinum *Amanuensis*, sum fær hóskandi viðbót. Í eini skiftistíð eigur hesin starvsbólkur at víðkast til at umfata verandi starvsfólk, sum ikki hava møguleika at uppstiga sín granskaraførleika til Ph.d. m.a. vegna aldur (smb. síðu 12).
h. Sambært lógini fyri Fróðskaparsetrið eigur undirvísingin á Setrinum at vera granskingargrundað. Við uppskotinum um nýggja starvsheitið *Kennari* er granskingin ikki longur tengd at undirvísingini. Tað verður mælt frá at formalisera kennarastørv á Setrinum, tí hesi størv ikki eru granskarastørv, men rein lærarastørv við 80 % undirvísing. Skipanin av vísindastørvunum í dag gevur longu rúm fyri, at undirvísast kann 80 % av arbeiðstíðini í eitt ávíst tíðarskeið.

i. Lestrarvegleiðingin á Setrinum kann í framtíðini knýtast afturat t.d. altjóða samskiparum og lestrarvegleiðarin kann eisini átaka sær undirvísing í lestrarteknikki, konfliktloysing o.a. Lestrarvegleiðarar eiga at vera staðsettir á megindeildunum (lokalir), tí tað er sera umráðandi, at lesandi hava best møguliga atgongd til lestrarvegleiðing bæði fyri at fyribyrgja fráfalli, fullføra útbúgvingina til ásetta tíð og samanseta einstaklinga útbúgvingargongdir.

**1.** Við støði í einum bygnaðardiagrammi fyri Fróðskaparsetrið grundað á núverandi bygnað (sí mynd 1) legði Hans Pauli fram uppskot til umrøðu um nýggjan bygnað (sí mynd 2).




**Mynd 1. Núverandi bygnaður/funktiónir á Setrinum**

Tá søga gjørdist eitt frøðiøki á Fróðskaparsetrinum, og bygnaðurin við megindeildum varð settur í verk, vórðu Søgudeildin og Føroyamálsdeildin í somu megindeild: Megindeildin fyri hugvísindi. Seinni bleiv samfelagsvísindi eitt øki á Fróðskaparsetrinum, og eftir eina tíð varð bygnaðarbroyting framd, so Føroyamálsdeildin bleiv ein megindeild fyri seg, meðan søga og samfelagsvísindi vóru samansjóðað til Megindeildina fyri søgu- og samfelagsvísindi. Røddir hava viðhvørt verið frammi um aftur at samansjóða Føroyamálsdeildina og Søgu- og samfelagsdeildina, m.a. fyri at fáa eina nýggja megindeild við størri fakligum volumin. Mynd 2 vísir eitt upplegg til broyting í verandi bygnað sambært hesum. Í upplegginum er Granskingardepilin fyri samfelagsmenning lagdur sum ein integreraður partur av Megindeildini fyri hugvísindi, men neyðugt er at viðgera hetta nágreiniligari, um tað skal gerast veruleiki. Niðurstøðan av umrøðuni av upplegginum varð, at tíðin enn ikki er búgvin til at fremja eina bygnaðarbroyting samsvarandi mynd 2.




**Mynd 2. Upplegg til framtíðar bygnað/funktiónir á Setrinum**




**Mynd 3. Tilmæli um framtíðar bygnað/funktiónir á Setrinum**

<u>Viðmerkingar í samband við heiti á mynd 1 og 2:</u>
*Útbúgvingarsamskipari*: Faklig planlegging av eini útbúgving og samskipan av undirvísingini (eisini tímatalvu)
*Ábyrgdarlærari*: Fakliga ábyrgd og tilrættisleggingarábyrgd av skeiði ella bólkum av skeiðum, herí m.a.

- planlegging og dagføring av skeiðunum (gera/fáa gjørdar skeiðslýsingar fyri skeiðini og undirvísingarætlanir tíma fyri tíma fyri skeiðini)
- Undirvísa og/ella finna leysalærarar til skeiðini
- Fyriskipa at próvtøkuhald verður sambært skeiðslýsingunum

*Ábyrgdarbólkur*: Fylgi-og ráðgevingarbólkur, mannaður við fakliga skikkaðum fólkum
*Starvsstovuleiðari*: Ábyrgd av innkeypi, viðlíkahaldi og rakstrarjáttan til starvstovuna.
*Inspektørur*: Arbeiðsuppgávur hjá inspektørinum eru saman við rektaranum at hava ábyrgdan av: ársætlan, tímatalvu, hølisviðurskiftum, próvtøkuætlan og lønarviðurskiftum.

<u>Viðmerkingar í samband við heiti á mynd 3:</u>
*Útbúgvingarleiðari*: Faklig planlegging av eini útbúgving og samskipan av undirvísingini (eisini tímatalvu)
*Ábyrgdarlærari*: Fakliga ábyrgd og tilrættisleggingarábyrgd av skeiði ella bólkum av skeiðum, herí m.a.

- planlegging og dagføring av skeiðunum (gera/fáa gjørdar skeiðslýsingar fyri skeiðini og undirvísingarætlanir tíma fyri tíma fyri skeiðini)
- Undirvísa og/ella finna leysalærarar til skeiðini
- Fyriskipa at próvtøkuhald verður sambært skeiðslýsingunum

*Ábyrgdarbólkur*: Fylgi-og ráðgevingarbólkur, mannaður við fakliga skikkaðum fólkum
*Starvsstovuleiðari*: Ábyrgd av innkeypi, viðlíkahaldi og rakstrarjáttan til starvstovuna.

Bygnaðarbólkurin bleiv ikki liðugur við viðgerðina av hesum máli, og avgjørt varð tí at taka málið upp aftur til viðgerðar á fundinum 18. februar 2010.

**2.** Leggjast skal afturat arbeiðsuppgávunum og heimildunum hjá dekanunum:

**a)** Dekanstarvið er eitt fulltíðar leiðslustarv. Tó er tað avgerandi, at dekanurin framhaldandi fylgir við og mennir gransking á sínum fakøki í setanartíðarskeiðinum.
**b)** 5 ára starvssetan av dekanstarvinum við møguleika fyri leinging.
**c)** Dekanur hevur ábyrgd av starvsfólkaviðurskiftum og trivnaði á deildini.
**d)** Dekanur setur PhD nevnd við vísindafólkum til at fylgja við í gongdini í PhD verkætlanum.
**e)** Dekanur hevur ábyrgd av at menna tvørfakligt samstarv.
**f)** Dekanur hevur ábyrgd av at menna inntøkufíggjað virksemi.

**Fundarfrágreiðing frá 17. februar 2010:**

**4.** Avtalað varð, at Jóannes skuldi fyrireika hetta mál, men av tí at honum barst frá at Møta vegna sjúku, fingu vit ikki viðgjørt málið.

**5.** Mælt varð til at leggja hesi punkt afturat uppskotinum til starvsskipan:

- ✓ Eftir hvønn fund skal fundarfrágreiðing skrivast og leggjast á heimasíðuna hjá Setrinum
- ✓ Vísindaligu umboðini í lestrarráðnum sita í 2 ár í senn, meðan umboð fyri lesandi sita í 1 ár í senn
- ✓ Tað skulu í mesta lagi vera 6 umboð í lestrarráðnum

**6.** Mælt var til at broyta tekstin fyri akademiskt ráð á Setrinum til:

Sambært Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya verður heimilað rektaranum at seta eitt akademiskt ráð galdandi fyri alt Setrið. Stýrið ásetur valreglur og starvsskipan eftir tilmæli frá rektara.

Endamál við akademiska ráðnum: At vera ráðgevandi ráð hjá rektaranum. Ráðið skal vera við til at tryggja, at undirvísing og gransking lúka altjóða krøv.

Akademiska ráðið er sett saman av rektaranum, ið er føddur formaður, og av 5 starvsfólkum úr vísindaliga starvsliðnum (einum umboði frá hvørjari megindeild) og tveimum umboðum fyri tey lesandi. Umboðini fyri vísindafólk og umboðini fyri studentar verða vald ávikavist av vísindafólki og studentum.

Mælt verður til, at akademiska ráðið millum annað hevur hesar uppgávur:

- ✓ Gevur rektaranum ella dekani tilmæli um innanhýsis býti av játtanum
- ✓ Gevur rektaranum tilmæli um sentral strategisk granskingar- og undirvísingarøki og ætlanir um "vidensudveksling"
- ✓ Verður við til at tryggja tey formligu viðurskiftini í samband við PhD-lestur
- ✓ Úttalar seg um øll akademisk viðurskifti, sum hava týdning fyri virksemi Setursins, og hevur skyldu at viðgera akademisk viðurskifti, sum rektarin leggur fyri ráðið.

**7.** Súsanna greiddi frá arbeiðinum, sum higartil varð gjørt á SRFS við at menna eina Starvsfólkahandbók. Í sambandi við framløguna varð víst á, at megindeildirnar eru komnar sera stutt ávegis við at menna ein heildar starvsfólkapolitikk, og at tað bert eru ávís øki, sum eru lýst við reglugerðum, eitt nú reglugerðir fyri eldrapolitikk, rúsevnisnýtslu og kreppuhjálp.

Mælt verður tí til, at ein felags starvsfólkahandbók verður ment av einum arbeiðsbólki á Setrinum. Megindeildirnar kunnu síðani byggja út eftir tørvi. Mælt verður eisini til, at hóskandi orka verður sett av til hetta átrokandi arbeiðið.

**8.** Framløgan hjá Randi bygdi millum annað á reglugerðina um samskiftisreglur á Fróðskaparsetrinum frá 21. februar 2008. Niðurstøðan í hesum máli var, at mælt verður til at endurskoða og menna samskiftisreglurnar á Fróðskaparsetrinum. Millum annað er neyðugt at áseta reglur um konfliktfyribyrging, at styrkja samskiftismannagongdir og fáa í lag og menna felags samskiftisamboð á Setrinum. Mælt verður til, at ein arbeiðsbólkur við 3 starvsfólkum verður settur at arbeiða við at menna felags samskiftisreglur fyri Setrið.

**Fundarfrágreiðing frá 18. februar 2010:**

**9.** Fíggjarleiðarin Hugin legði fram uppskot um miðsavnan av fíggjarøkinum, sum Rúna og hann høvdu fyrireikað.

Fyri at tryggja eina effektiva og professionella fíggjarumsiting eigur alt fíggjarøkið at verða miðsavnað á einum stað í einum fakligum umhvørvi, sum í størri mun fer at skapa meir gjøgnumskygni innan fíggjarøkið á øllum deildunum. Hetta fer somuleiðis at vera við til at menna hagtalsgrunnar av ymiskum slag, soleiðis at til ber

at lýsa alt virksemisøkið, sum Fróðskaparsetur Føroya varðar av, mótvegis dekanum, rektara, stýri, Mentamálaráðnum, Landsgrannskoðaranum o.ø.

At hava vitanina savnaða í einum fakligum umhvørvi styrkir somuleiðis um dygdina í ráðgevandi uppgávum innan fíggjarøkið og innan starvsfólkaøkið.

Miðsavnanin vil somuleiðis verða við til at stuðla undir eina munagóða fíggjarstýring í mun til ætlan og leggur upp til eitt størri samstarv við miðfyrisitingina og dekanarnar úti á megindeildunum.

Fyri at tryggja eina munadygga fíggjarstýring verður somuleiðis neyðugt at útbyggja undirstøðukervið við innanvirkisfíggjarstýring, sum er grundarlag fyri lógarásettu mál- og avriksstýringini.

Uppgávur, sum eiga at verða fluttar til miðfyrisitingina sum skjótast, eru hesar:

- ✓ Bókingar av øllum virkseminum á Fróðskaparsetur Føroya
- ✓ Allar bókingar av web-lønum
- ✓ Útgjald av løn til leysalærarar og samskipan av hesum
- ✓ Leysgeving av rokningum fyri alt Fróðskaparsetur Føroya
- ✓ Leysalærarar samskipast (hagtalsgrunn) og gjaldast umvegis web-løn
- ✓ Starvsfólkamál, formlig viðurskifti eins og flokking, setanarbræv, lønarútgjald o.a.
- ✓ Allar verkætlanir skulu umsitast av miðfyrisitingini, og leiðreglurnar um overhead skulu endurskoðast
- ✓ Samskipan av øðrum inntøkufíggjaðum virksemi, t.d. skeiðsvirksemi
- ✓ Umsita ferðaforskot og ferðauppgerð hjá øllum megindeildum.

Ein av avleiðingunum av at miðsavna fíggjarøkið er, at hetta kemur at frígeva ressursir á megindeildunum, meðan tað hinvegin verður tørvur á at fáa tilført ressursir til miðsavnanina. Ein leyslig meting av arbeiðsbyrðuni at yvirtaka allar bókingar, web-løn, starvsfólkamál, ráðgeving til megindeildirnar og umsiting av øllum verkætlanum er mett til 1¾ ársverk, sum má fíggjast av verandi játtan, sum Fróðskaparsetur Føroya varðar av.

Uppskotið varð væl móttikið. Mælt varð til, at um stýrið velur at miðsavna fíggjarøkið, verður tað sera umráðandi at betra samskiftið millum miðfyrisitingina og megindeildirnar á fíggjarøkinum, millum annað við at skipað verður fyri regluligum fundum við dekanarnar og at kvartalsligu uppgerðirnar, sum verða sendar til stýrið, eisini verða sendar til dekanarnar.

---

Góðskutrygging av Ph.D.-tilgongdini
Á fundinum varð tikið afturíaftur orðaskiftið um góðskutrygging av Ph.D.-tilgongdini á Setrinum, sum var í sambandi við viðgerðina av akademiskum ráði. Mælt varð til, at hvør deild eftir tørvi velur eitt Ph.D.-ráð við endamálinum at góðskutryggja Ph.D.-tilgongdirnar á Setrinum. Ráðið skal vera eitt tilmælandi ráð til dekanin. Skotið varð upp, at uppgávurnar hjá Ph.D.-ráðnum verða hesar:

- ✓ Geva dekaninum tilmæli um andmælingar at seta í metingarnevndir

- ✓ Vera við til at menna mannagongdir, reglugerðir og sáttmálar fyri Ph.D.-lesandi
- ✓ Geva dekaninum tilmæli í málum av týdningi fyri Ph.D.-tilgongdina

Tikið varð eisini afturíaftur fundarfrágreiðingina frá 16. februar 2010. Minni broytingar vórðu gjørdar í máli 3, har henda orðingin um amanuensis varð løgd afturat hinum viðmerkingunum:

> "Mett verður, at tørvur er á nýggja starvsbólkinum amanuensis, sum fær hóskandi viðbót. Í eini skiftistíð eigur hesin starvsbólkur at víðkast til at umfata verandi starvsfólk, sum ikki hava møguleika at uppstiga sín granskaraførleika til PhD m.a. vegna aldur."

*Mál 1., sum eisini varð viðgjørt 16. august, varð tikið upp aftur til viðgerðar og endaliga orðingin bleiv henda:*

**1.** Viðmerkingar til framtíðar skipanina av megindeildum á Setrinum og uppskotið frá Hans Paula um nýggjan bygnað (framhald av viðgerð):

i. Funktiónir undir fyrisitingarstjóranum eru ikki bókhald, men fíggjarøkið.
ii. Starvsinnihaldið hjá inspektørinum á FLSK hevur sama innihald sum útbúgvingarleiðari á hinum megindeildunum. Lønarviðurskiftini eru flutt til SSS.
iii. Semja var um, at útbúgvingarleiðarar og útbúgvingarsamskiparar eru somu funktiónir á deildunum á Setrinum. Mælt verður til, at heitið útbúgvingarleiðari skal nýtast framyvir.
iv. Semja var um, at tørvur er á at hava ein felags eftirútbúgvingarpolitikk á Setrinum og at neyðugt er at menna eftirútbúgvingina soleiðis, at hetta kann vera ein vaksandi inntøka fyri Setrið. Ein tílíkur politikkur kann millum annað áseta, at grundútbúgvingar eru ókeypis, meðan allar eftir- og ískoytisútbúgvingar skulu fíggjast við gjaldi.
v. Mælt verður til, at fyrisitingin av játtanini av eftirútbúgvingini fyri lærarar verður á SSS, meðan tilrættalegging og framleiðsla kunnu liggja á megindeildunum.
vi. Tað varð mett mest hóskandi, at lestrarvegleiðingin verður løgd til megindeildirnar. Mælt verður til eina skipan, har eldri lesandi eru mentorar fyri nýggj lesandi (víst verður til mál 3, punkt i).
vii. Mælt verður til at umhugsa at leggja felags funktiónir desentralt og at miðsavna aðrar funktiónir, soleiðis at framleiðslan er á eini deild, sum kann uppnáa synergieffektir og eliminera dupultfunktiónir, men tá má tryggjast, at allar deildir fáa sínar tillutaðu tænastur, og at miðfyrisitingin ikki missir stýring við játtan o.ø.
    1. Dømi um hetta kann vera at leggja KT-tænastuna á NVD og harvið draga nyttu av KT-førleikanum á megindeildini.
    2. Dømi kann eisini vera, at SSD umsitur skeiðstænastu vegna alt Setrið (grundað á royndirnar við gjaldsskeiðum á SSD).
    3. Í øðrum førum er fyrimunurin at sentralisera – sum nevnt er viðvíkjandi fíggjarstýring, lønarviðurskiftum og umsiting av eksternum játtanum (smb. viðgerð av mál 9).
viii. Umráðandi er, at KTT verður styrkt munandi bæði viðvíkjandi førleika og fleiri ressursum.
ix. Uppskotið frá Hans Paula til nýggjan bygnað leggur upp til eina samanlegging av SSD og FMD fyri at fáa betri synergi millum hesar megindeildir. Niðurstøðan á fundinum var, at hetta ikki er nakar fyrimunur í

løtuni, m.a. tí at megindeildirnar ikki húsast saman. Betri er at fyrireika samstarv millum megindeildirnar fyrst við at samskipa útbúgvingarnar og framleiða skeið fyri hvørja aðra – og saman. Henda tilgongd kann skapa grundarlag fyri seinni væleydnaðari samanlegging.

x. Mælt verður til, at dekanarnir í felag koma við tilráðing um, at megindeildir samskipa útbúgvingarnar og framleiða skeið fyri hvørja aðra – og saman, og skipan av øðrum felags funktiónum umframt inntøkufíggjað virksemi (sí annars starvslýsing hjá dekanunum).

xi. Fyri at tryggja eina effektiva og professionella fíggjarumsiting eigur alt fíggjarøkið at verða miðsavnað á setursfyrisitingini (smb. mál 9).

xii. Mælt verður til, at Setrið arbeiðir fyri at fáa felags setanar- og lønarviðurskifti fyri allar starvsbólkar á Setrinum.

xiii. Mælt verður til at tíðaravmarka øll leiðslustørv á Setrinum til 5 ára starvssetanir við møguleika fyri leinging.

Á fundinum vórðu strategiætlaninar hjá megindeildunum gjøgnumgingnar. Tað varð tó ikki mett, at vit høvdu tíð til at gera eina felags niðurstøðu við grundarlagi í strategiætlanunum hjá megindeildunum.